deildin

**EB/Streymur**
**FO-470 Eiði**
**www.eb-streymur.fo**

**STOVNAÐ**
**23.01.1993**

**FORMAÐUR**
**Rólant Højsted**

**MEISTARAR**
**2008**

**STEYPAVINNARAR**
**(2)**
**2007, 2008**

**GREIPUVINNARAR**
**(1)**
**2008**

**Í BESTU DEILDINI**
**(9 ár)**
**1994 og 2001-**

**Í EUROPA (2)**
**UEFA Cup 2007/08**
**2008/09**



**Fyri góðum ári síðani ætlaði Egil á Bø sær at gevast sum fótbóltsspælari. Í er hann greipuvinnari og landsliðsspælari, og veteranurin er til reiðar at tørna út fyri EB/Streym enn eitt kappingarár**
Mynd: Sofus D. Johannesen

# Nýggj støða í Sundalagnum

**Fyri fyrstu ferð skulu teir í EB/Streymi hava leiklutin sum favorittarnir, ið allir hinir so fegnir vilja vinna á**

Teir eru á aldukambinum í EB/Streymi. Felagsliðið megnaði í fjør fyri fyrstu ferð at vinna FM heitið, og at teir í Sundalagnum áttu besta liðið av øllum varð undirstrikað so dyggiliga, tá ið teir eisini vunnu steypakappingina.

Í fótbóltssøguni – eisini tí føroysku – finnast fleiri dømi um feløg, sum, eftir at hava vunnið fyrsta meistaraheitið, hava havt torført við at fóta sær, og eru komin illa fyri.

Nú er EB/Streymur í tí støðuni at vera nýtt meistaralið og steypavinnaralið.

Eingin ivi er í, at hetta fer at bera við sær, at hini feløgini fara at vera serliga uppsett, tá ið Sigfríður Clementsen og hansara menn vera mótstøðuliðið.

Tað er heldur eingin ivi um, at Sigfríður Clementsen og hansara menn fara at verða væl betri fyri at tackla nýggju støðuna, enn so mong onnur felag í somu støðu áður hava verið tað.

At meistaraliðið er væl mannað varð eitt nú staðfest í sambandi við landsliðsúttøkuna undan ferðini til Íslands. Fleiri úr EB/Streymi vóru á landsliðnum, enn tað vóru úr nøkrum øðrum felag, og hóast talan hevur verið um lutfalsliga stóran gjøgnumtrekk í Sundalagnum í vetur, so sigur manningarlistin, at aftur í ár verður meistaraliðið millum fremstu evnini til ovasta plássið.

Serliga nógvar hava útskiftingarnar verið á miðvøllinum: Mikkjal Thomassen, Hanus Eliasen og Høgni Zachariasen teljast millum teirra, sum vóru í felagnum í fjør, og sum ikki vera á liðnum í ár. Talan er um rættiliga eyðsýndar spælarar. Men at missurin neyvan fer at kennast aftur í avrikunum kemst av, at felagið hevur fingið aðrar spælarar, sum heilt víst fara at vera við til at varðveita og kanska styrkja javnvágina á liðnum.

Eitt nú Paula G. Hansen, sum var krumptappurin á góða Skála miðvøllinum, Pætur Dam Jacobsen, Gudmund Nielsen og Santos. Allir borga teir fyri støðugum avrikum og góðsku.

Sigfríður Clementsen og Magni Mohr hava síðani eina ferð í november mánað verið í holtur við at trimma liðið. Tað er kapping um plássini, og tað kann væl vera, at aðrir enn teir, sum í fjør vóru sjálvskrivaðir, fara at treingja á fyri at vinna pláss millum teir fyrstu ellivu. Undir øllum umstøðum høvdu allir teir, sum eru á spælaralistanum, í flestu feløgunum verið upplagdir at verið valdir millum teir fyrstu ellivu.

## Hópurin hjá EB/Streymi:

**MÁLVERJAR:**
René Torgarð (áður spælt við B36)
Gunnar á Steig (KÍ, B68)

**VERJULEIKARAR:**
Egil á Bø (ÍF, B36)
Marni Djurhuus
Leif Niclasen
Alex José dos Santos (B36)
Pætur Dam Jacobsen (AB, Skála)
Gert Hansen
Dánjal Davidsen

**MIÐVALLARAR:**
Hans Pauli Samuelsen
Bárður Olsen
Brian Olsen
Pauli G. Hansen (Skála)
Levi Hanssen (Skála, B36)

**FRAMHERJAR:**
Arnbjørn Hansen
Sorin Anghel
Gudmundur Nielsen (B71)
Tonny Kruse

**VENJARAR:** Sigfríður Clementsen
Magni Mohr

**TILGONGD:**
Pætur Dam Jacobsen, Skála
Pauli G. Hansen, Skála
Gudmundur Nielsen, B71
Alex José dos Santos, B36

**FRÁGONGD:**
Fróði Clementsen, B36
Mikkjal Thomassen, givin
Anders Post Jacobsen, FC Hjørring
Peter Foldgast, FC Vestsjælland
Hanus Eliasen, ÍF
Høgni Zachariasen, ÍF
Marcell Balog, Kerskemeti Te KFT

Saman við okkum røkkur tú longri
Føroya Banki er errin av at samstarva við EB/Streym.
FØROYABANKI